B36 fann stevi› aftur

NSÍ kom til Havnar vi› sjálvsálitinum í hæddini, men ta› vóru nakrir naka› nipnir runavíkingar, sum fóru av aftur vøllinum vi› størsta tapinum í ár

Runavíkingar hava flogi› høgt seinastu tí›ina, men sunnudagin komu teir so ruddiliga ni›ur aftur á jør›ina

STEFAN Í SKORINI

B36 - NSÍ 5-0 (1-0)

Ta› leika›i javnt á í fyrra hálvleiki, men NSÍ var avgjørt vandamiklari frammanfyri málinum hjá B36, men einki spurdist burturúr teimum stóru málmøguleikunum.

Ta› var tó B36, sum fekk einasta máli› fyri ste›gin, og í seinna hálvleiki var einki skil á NSÍ verjuni, og málini skola›u inn.

Sjálvsáliti› í lagi

NSÍ li›i› hev›i undan hesum dystinum vunni› fimm av seks teimum seinastu dystunum. Tískil skuldi eingin for›ing veri› fyri at bast B36, sum hevur veri› í ringum sjógvi í seinastuni. Nógvir mans eru farnir úr felagnum, men sunnudagin vístu teir, at ta› ber til at klára seg vi› egnum fólki.

Fyrsta korteri› var merkt av, at bæ›i li›ini gjørdu ásko›arunum greitt, at tey ætla›u sær naka› har frammi á vøllinum.

Ta› var tó B36, sum kanska hev›i tey vandamiklaru álopini fyrstu løtuna, og eitt av hesum enda›i eisini vi› máli.

Aftasti ma›ur hjá B36, Egil Zachariassen, setti eitt skjótálop í gongd. Hann rak langt inn á hálvuna hjá NSÍ og kom í gó›a skotstø›u, eftir at hava spælt saman vi› áleyparunum. NSÍ verjuleikari vardi í fyrstu atløgu, men Egil fekk fatur á bóltinum aftur, og ivaleysur langa›i hann til. 1-0 til heimali›i›.

NSÍ kendi ikki vitjunartí›ina

Eftir fyrsta máli› tveitti NSÍ ta› syndri› av varsemi, sum enn var eftir, og fleiri sera vandamikil álop vór›u sett í verk. Serliga brutu runavíkingar ígjøgnum í høgra bor›i, har Jens Kristian Hansen spældi, men ongantí› spurdist naka› burturúr.

Fyrsta stóra møguleikan hev›i Jónstein Petersen, sum tó var eina sponn ov stuttur vi› aftaru stong, tá sent var› innfyri. Máli› var annars opi›, og bara ein fótur vanta›i á.

Sjúr›ur Jacobsen var á mi›vøllinum hjá NSÍ, og hann var sera dugnaligur at koma vi› í álopsspæli›. Hann dugdi væl at koma í gó›ar stø›ur í brotsteiginum, men royndirnar á máli› vóru ikki naka› at reypa av. Hann var tó eisini nær vi›. Ta einu fer›ina bjarga›i Fró›i Clementsen skotinum, me›an Tróndur bloker-a›i vi› beinunum, tá Sjúr›ur var› spældur leysur av Christian Høgna Jacobsen.

Ta seinnu løtuna í fyrra umfari var B36 li›i› tr‡st av NSÍarum, men teir høvdu fleiri kontramøguleikar, men tann seinasta avgerandi sendingin kom ongantí›. Serliga var ta› Magni á Lakjuni, sum darva›i B36, tá hann fekk bóltin, men a›rir vóru eisini sekir í hesum.

NSÍ var sum heild naskari frammanfyri málinum enn B36, og vóru teir raskir at brodera seg ígjøgnum, men Tróndur var bara tvær fer›ir noyddur at vísa síni kynstur fyri ste›gin. Christian Høgni Jacobsen lúrdi allatí›ina uppá møguleikar, og hann bjó›a›i seg eisini nógv til.

Tá hálvur var› farin, fekk hann vent sær í málteiginum, men hart kroystur var skoti› ov veikt, og Tróndur vardi.

Beint fyri ste›gin var Sjúr›ur Jacobsen aftur nær vi›. Hann kom at standa væl fyri, men skoti› bar vi› stongina og fór útum. NSÍ hev›i nógvar møguleikar at skora, men teir megna›u ikki at fullføra tey mongu álopini.

NSÍ fellur í fátt

Seinni hálvleikur sá fyrst ikki út til at fara at gerast ein málveitsla hjá heimali›num, men tá Egil Zachariassen naka› heppi› økti um lei›sluna til 2-0, var alt fok-i› hjá gestunum, og B36 slapp at hóreiggja sær sum teimum lysti. Einastu royndirnar frá NSÍ vóru nøkur skot langt útifrá, sum ikki vóru vandamikil.

Næsta máli› kom eftir fimtan minuttir, tá Jákup á Borg fekk fríspark í vinstru sí›u. Hann lyfti stutt inn til Magna á Lakjuni, sum tamdi vi› bringuni og langa›i til uppá mál. Hann rakti tó ikki máli›, men ísta›in Egil Zachariassen og bólturin smeyg sær upp í horni›.

Tveir minuttir seinni sendi Rógvi Róin eina dreymasending fram til Magna á Lakjuni, sum rak inn í brotsteigin og leg›i tvørturum til Jákup á Borg, i› ótarna›ur kundi leggja vertirnar framum 3-0.

Eftir hetta var einki um NSÍ, og fer› eftir fer› komu B36arar í stórum tali stormandi oman móti Rúna Joensen, sum hjálparleysur bara kundi hyggja at, me›an bóltarnir fóru inn.

B36 hev›i óteljandi møguleikar at økja um lei›sluna, tí fleiri fer›ir vóru teir í yvirtali, men ofta var tann seinasti bólturin ikki nóg neyvur.

Seinastu løtuna bragda›i aftur hjá B36, og Magni á Lakjuni fekk endiliga máli›, sum honum hev›i sta›i› í bo›i fleiri fer›ir. Jákup á Borg fann Magna í brotsteiginum, og róliga sendi hann bóltin framvi› málverjanum.

Seinasta máli› fekk Jákup á Borg. Li›forma›urin, Jens Kristian Hansen, fann Jákup, sum uttalaga í brotsteiginum setti fótin á bóltin fyrstu fer› til endaligu stø›una 5-0.

B36 avger› føroyameistaraheiti›

Í síni heild var dysturin naka› óskipa›ur, og kom hetta serliga til sjóndar í seinna hálvleiki. Stórir taktiskir veikleikar vóru at síggja hjá runavíkingum, sum ikki spældu allan dystin, men løgdu árarnar inn naka› tí›liga.

Tveir teir næstu dystirnir hjá B36 eru móti HB næsta vikuskifti› og VB vikuna eftir. Teir kunnu tískil avgera meistaraheiti›, og hesin dysturin er kanska vi› til at geva teimum sjálvsáliti›, so teir kunnu koppa grannunum næstu fer›. B36 hevur einki at spæla fyri, men kanska teir kunnu arga HB.

B36-NSÍ 5-0 (1-0)
1-0: Egil Zachariassen 14
2-0: Egil Zachariassen 62
3-0: Jákup á Borg 63
4-0: Magni á Lakjuni 85
5-0: Jákup á Borg 86

Dómari: Niklas á Lí›arenda (GÍ)
B36:
Tróndur Vatnhamar - Egil Zachariassen, Fró›i Clementsen, Herbert í Lon Jacobsen - Jens Kristian Hansen, Rógvi Róin, Jan Guttesen, Jákup á Borg, Klæmint Matras

NSÍ:
Rúni Joensen - Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard - Gert Langgaard, Sjúr›ur Jacobsen, Brynjálvur Nielsen, Ian Højgaard, Jónstein Petersen - Dánjal Hansen, Christian Høgni Jacobsen

TB dotti› burturmillum

2. deild: TB tapti 3-2 heima á Sevm‡ri móti NSÍ, og nú eru vónirnar hjá tvørámonnum at vinna sæti í 1. deild ikki so bjartar longur

STEFAN Í SKORINI

TB-NSÍ 2-3 (2-1)

TB hevur elt EB/Streym stø›ugt alt kappingarári›, men nú tykist sum tvørámenn eru farnir at dragna. Eftir tapi› á heimavølli móti NSÍ eru teir á trij›a plássi, og møguleikarnir at flyta upp eru nógv vikna›ir.

Ta› sær út til at teir eru farnir at mø›ast, tí í seinastu trimum dystunum er bara eitt stig fingi› til høldar. Merkisvert er eisini, at tveir teir seinastu heimadystirnir eru enda›ir vi› tapi.

TB var frammanfyri tvær fer›ir leygardagin, men hóast lei›slurnar megna›u teir ikki at vinna avgerandi dystin. Eins og seinast TB var á heimavølli fóru tr‡ mál ígjøgnum.

TB fekk eina sera gó›a byrjan. Jón Johannesen leg›i TB framum, bara hálvan minutt eftir at dómarin hev›i sett dystin í gongd. NSÍ svara›i tó skjótt aftur, tí bara sjey minuttir eftir fyrsta máli› javna›i Petur Hammer. Bergur Djurhuus sendi eitt hornaspark innfyri, og Petur Hammer var fyrst á bóltinum vi› aftaru stong og fekk beint hann í máli›.

NSÍ li›i› fekk bló› á tonna eftir máli›, men hóast leikliga yvirvág spurdist einki burturúr. Ísta›in vóru ta› tvørámenn, sum vóru vandamiklari frammanfyri máli›.

Aftur var ta› Jón Johannesen, sum stó› fyri málinum. Hann gjørdist púra leysur í brotsteiginum, og iva›ist ikki men langa›i til. 2-1 til heimali›i›, tá fyrri hálvleikur var› spældur, og útlitini vóru tískil gó› hjá heimli›num til seinna umfar.

TB tveitti tó alt fyri bor›, tá dómarin setti spæli› í gongd aftur. Nú vóru ta› hinvegin gestirnir, sum tóku stig til at skapa málmøguleikar, og TB fekk ikki ordiliga fótin fyri seg.

Stutt inn í seinna hálvleik javna›i NSÍ fyri a›ru fer›. Dagfinn Olsen leg›i innfyri úr høgru sí›u, og vi› handaru stong stó› Magnus Hansen, sum kundi fáa javnvág í roknskapin. TB rakna›i heldur ikki vi› eftir hetta, og leingi sá ta› út til, at li›ini skuldu fáa eitt stig í part burturúr dystinum.

Men í seinasta minutti skora›i Bergur Djurhuus sigursmáli›. Hann rak av egnari hálvu, og vi› brotsteigarmarki› gjørdi hann av at royna seg móti málinum, og ta› gav bonus. 3-2 til NSÍ og Bergur Djurhuus var dagsins hetja, sum gav tvørámonnum mønustingin.

TB hevur nú ongan møguleika at flyta beinlei›is upp, men enn kunnu teir sleppa at spæla uppflytingardyst. Um ÍF snávar móti EB/Streymi á Mølini næsta vikuskifti› er møguleikin til sta›ar. TB hevur tó ein sera torføran dyst móti KÍ í Klaksvík næsta vikuskifti›, tí KÍ byrnjar seg í løtuni vi› landsli›sleikarum. Hinvegin er seinasti dysturin ímóti Royn, sum ikki er tann mest ræ›andi mótstø›an beint nú.

TB-NSÍ 2-3 (2-1)
1-0: Jón Johannesen
1-1: Petur Hammer
2-1: Jón Johannesen
2-2: Magnus Hansen
2-3: Bergur Djurhuus

Myndatekstur:
Vónin hjá TB um beinlei›is uppflyting hvarv leygardagin, og nú kunnu teir ikki sjálvir avgera, hvussu lagnan fer at ver›a
Mynd: SJH

Todi setti fer› á

Fyri fyrstu fer› var Johan B. Hansen í OB verjuni frá fyrsta bríksli

Ta› er gott lag í FCK. Eftir eina kappingarbyrjan, sum bendi á, at talan fór at ver›a um endurtøku frá í fjør – óstø›ugt spæl og langt ímillum sigrarnar – er gongdin fullkomuliga vend tær sí›stu vikurnar. Eftir at Jacob Laursen er komin í verjuna og Ståle Solbakken er komin á mi›vøllin hevur FCK vunni› hvørja fer›. Teir vóru á áttanda plássinum fyri f‡ra vikum sí›ani. Nú eru teir á tri›ja plássinum.

Hesa fer› høvdu teir vitjan av OB. Fyri danir var ta› mest merkisverda vi› OB li›num, at Carsten Hemmingsen, sum inntil fyri trimum vikum sí›ani spældi í FCK, var á OB li›num.

Frá einum føroyskum sjónarmi›i er ta› sera áhugavert at sta›festa, at n‡ggjasti føroyski landsli›sspælarin, Johan B. Hansen, fyri fyrstu fer› var í OB verjuni frá fyrsta bríksli. OB hev›i skipa› li›i› í 4–5–1 uppstilling, og Johan B. Hansen var ytstur í høgra bor›i.

Sí›stu løtuna royndi OB at javna. Ta› resta›u níggju minuttir, tá Johan B. Hansen, sum stutt frammanundan hev›i fingi› gula korti›, var› skiftur út.

Todi bí›a›i í meiri enn ein tíma

FCK venjarin, Roy Hodgson, hev›i undan dystinum gjørt av, at Todi Jónsson skuldi vera á beinkinum. Sviin Patrick Simpson, sum eisini hevur veri› skaddur, var í álopinum í sta›in fyri nor›mannin Harald Brattbakk, sum var leikbanna›ur. Venjarin seg›i seg ikki tora at hava tveir spælarar inni, sum akkurát vóru komnir fyri seg eftir ska›ar.

Todi Jónsson kom á vøllin í 69. minutti. Inntil tá hev›i spæli› ikki veri› naka› serligt, og málmøguleikarnar høvdu veri› fáir. David Nielsen kom inn saman vi› Toda. Hann avloysti Simpson, og Todi avloysti Thomas Thorninger.

Sambært donsku pressuna settu teir bá›ir innskiftararnir fer› í FCK álopsspæli›, og ta› er neyvan nakar ivi um, at Todi ver›ur ímillum teir fyrstu ellivu næstu fer›.

Einasta máli› kom í 74. minutti. Enn eina fer› var ta› Ståle Solbakken, sum skora›i. Hesa fer› var ta› eftir hornasparksinnlegg úr høgru, sum David Nielsen snitta›i ví›ari innfyri máli›.

jh



Annan dystin á ra› var Ståle Solbakken matcvinnari hjá FCK, sum nú hevur vunni› f‡ra fer› á ra›

Herfølge kiksa›i á heimavølli

Venjarin metti, at spælararnir vóru ikki komnir fyri seg eftir fer›ina í Stokholm

Eftir at ta› hevur gingi› sum eftir ánni í fleiri vikur kiksa›i Herfølge sunnudagin á heimavølli. Teir høvdu vitjan av n‡ggja li›num í superliguni FC Midtjylland ella bara FCM, sum ta› ver›ur nevnt, og gestirnir fóru til hús aftur vi› øllum stigunum.

Einasta máli› kom í 44. minutti. Eftir hornaspark og út frá var ta› Peter Sand, sum st‡rdi bóltinum inn um Jákup Mikkelsen. Peter Sand er stóribeiggi hjá Ebbe Sand, sum er danskur landsli›sspælari (hann skora›i 16. august fyrra máli›, tá Danmark vann 2–0 á Tórsvølli).

Herfølge vísti ikki ey›kendi ídni og strí›sviljan, sum sí›stu vikurnar hevur bori› fleiri stig vi› sær, og sum hev›i vi› sær, at teir vunnu Europa Cup dystin í Stokhol hóskvøldi›.

FCM, sum er næstfremst í superliguni, hev›i meiri spæl, og teir høvdu fleiri møguleikar. At teir bara fingu eitt mál komst av, at Jákup Mikkelsen var tryggur í málinum.

Eftir dystin ásanna›i John Faxe Jensen, sum sjálvur var á mi›vøllinum hjá Herfølge, at ta› tóktist sum um spælararnir hjá honum ikki vóru komnir fyri seg aftur eftir fer›ina í Svøríki. Hetta seg›i hann seg vita alt um frá tí›ini í Arsenal og Brøndby.

Men hesum vildi verjuspælarin Steven Lüstu ikki finna seg í:

– Vit ætla at koma ví›ari í Europa Cup. Um ta› eydnast, og ta› passar, sum venjarin sigur, so fer ta› at enda heilt gali› í landskappingini, seg›i hann.

jh

Flo fer frá Kurt

Føroyska felagi› í norskum fótbólti vann enn eina fer› sannførandi stórsigur

Ta› gongur framvegis sum eftir ánni hjá Sogndal. Hesa fer› høvdu teir vitjan av Strindheim, sum var› sent til hús aftur vi› 6–1 tapi›. Stø›an í hálvleikinum var 2–1, men munurin í spælb‡ti og møguleikum var nógv størri, enn tølini frá fyrra umfarinum benda á.

Tommy Øren setti hol á vi› brotssparki, tá tíggju minuttir vóru farnir, Alexander Ødegaard økti til 2–0 í 33. minutti, og tveir minuttir seinni minka›i Strindheim um munin, tá teir fingu brotsspark.

Í 2. hálvleiki fekk Sogndal f‡ra mál afturat. Kristian Ystaas, sum var í álopinum fyri leikbanna›a Kurt Mørkøre, skora›i til 3–1 og 5–1, Alexander Ødegaard skora›i til 4–1, og Anders Stadheim slerdi 6–1 sigurin rimmar fastan.

Kurt Mørkøre var leikbanna›ur, tí hann í dystinum ímóti Sandefjord fekk fimta gula korti›. Hans Fró›i Hansen og Julian Johnsosn vóru allar 90 minuttirnar stu›lar á li›num hjá Sogndal.

Ta› hevur veri› spenningur um, um ta› fór at eydnast Kurt Mørkøre at gerast toppskjútti í næstbestu deildini. Fyri tann møguleikan var ta› harmuligt, at Kurt Mørkøre ikki var vi› sunnudagin. Hann hev›i ivaleyst veri› ma›ur fyri at skora eini tvey ella tr‡ mál.

Størsti kappingarneytin hjá Kurt um ovasta plássi› á máltindinum er Jostein Flo. Hann er í álopinum hjá Strømgodset, sum er eitt pláss omanfyri Sogndal. Sunnudagin var Strømgodset á útivølli ímóti Sandefjord. Strømgodset vann 4–0, og í 2. hálvleiki skora›i Jostein Flo bæ›i málini. Hann er tiltikin fyri høvu›spæli›, og ta› var vi› høvdinum, at hann skora›i bæ›i málini. Jostein Flo hevur nú skora› 22 mál, me›an Kurt Mørkøre hevur skora› 19 mál.

22 umfør eru avgreidd. Ta› eru 26 umfør tilsaman, og alt bendir framvegis á, at Sogndal eftir kappingarlok skal spæla tveir dystir um eitt pláss í bestu deildini.

jh

Óli sá reytt í Aalborg

AGF var undirmanna› sí›stu sjey minuttirnar, tá teir vóru óhepnir og taptu fyri fimtu fer› á ra›

Lagi› í AGF og í Århus er einki serligt. Fíggjarliga stø›an er út av lagi vánalig, og inntil ífyrrakvøldi› bendi einki á, at nakar av álvara ætla›i at gera nakra roynd at venda gongdini. Seint í fyrrakvøldi› settu teir ein n‡ggjan stjóra. Hann er el– installatørur, og so er spurningurin, um hann fer at megna at var›veita fatningin og fáa felagi› og li›i› í stødi›!

Óli Johannesen var ímillum teir fyrstu ellivu í Aalborg. Hann var ytstur í høgra verjubor›i. Í 32. minutti fekk Óli gult kort, og í 83. minutti fekk hann aftur gult kort og royndi tískil fyri fyrstu fer› í superliguni at ver›a sendur av vøllinum. Seinna gula korti› stó›st av, at Óli misti bóltin og tók um mi›juna á manninum, sum tók bóltin av honum.

AGF var sera óheppi› at tapa ímóti AaB. Á›renn naka› mál kom, hev›i Bo Nielsen tvær fer›ir fingi› bóltin í neti› aftanfyri AaB málverjan, men bá›u fer›irnar var› kolldømt fyri rangstø›u.

AGF hev›i yvirvág, men Søren Frederiksen stúta›i tvær fer›ir í AGF máli›, og so hjálpti ta› einki, at Bo Nielsen eftir fyrra AaB máli› megna›i at javna til 1–1.

jh